# Nú er HB fremst



LIÐSKIPARAR

*Liðskipararnir báðir í hvør sínum enda. Evrard Blé hjá botnproppinum AB, og Fróði Benjaminsen hjá nýggja oddaliðnum HB*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Tað er einki, sum kemur óvart á við Havnar Bóltfelag. Besta mansliðið hjá felagnum reisir seg altíð, og nú eru teir reyðu og svørtu fremstir í Vodafonedeildini

Uni Holm Johannesen

Tað kom óvart á fleiri, at HB valdi brádliga at siga íslendska Kristjan Guðmundsson úr venjarastarvinum í farnu viku.

Grundgevingin var, at úrslitini vóru ikki nøktandi. Liðið strembar eftir føroyameistaraheitinum, og liðið var trý stig frá ovasta sessinum. Tað varð ikki góðtikið.

Nú er HB fremst. Julian Hansen loysti íslendska venjaran av, og við tveimum sigrum upp í slag hava verandi føroyameistararnir beina kós móti gullinum.

Í gjár vóru grannarnir av Argjum sendir heim úr Gundadali við einum 3-0 tapi í viðføringum.

Fýra dystir eru eftir at spæla. 12 stig at spæla um.

## Vunnu greitt

Sigurin hjá HB í Gundadali var fult uppiborin.

AB royndi at stríðast, men heimaliðið hevði tamarhald á dystinum.

Fróði Benjaminsen legði heimaliðið á odda, og Rógvi Poulsen staðfesti sigurin við tveimum málum í seinna hálvleiki.

Merkisvert var, at Rógvi Holm og Thordur Hreidarsson royndu ikki stórvegis at luttaka í framrættaða spælinum. Tað sást serliga í kroystum støðum, tá miðverjarnir bara valdu at sparka bóltin burtur, heldur enn at spæla seg úr trupulleikunum. Tað vísti seg at rigga væl.

## NSÍ snávaði

Runavíkingar eru í trupulleikum í løtuni.

NSÍ hevur ikki vunnið í seinastu seks landskappingardystunum. Í gjár snávaði liðið á heimavølli móti Víkingi, sum ger eina seinastu roynd at bjóða av í gullstríðnum.

Erland Berg Danielsen stýrdi bóltinum í egi mál, tá seinni hálvleikur var hálvrunnin.

## B71 fer frá

B71 hevur økt um fjarðstøðuna niður til FC Suðuroy, sum stríðist fyri at sleppa upp um niðurflytingarstrikuna.

Sandoyingar spældu málleysan javnleik á heimavølli móti B36 mikukvøldið. Nú er tað fýra stig sum skilja liðini.

FC Suðuroy tapti 2-5 á útivølli móti EB/Streymi. Sundalagsmenn vóru skelkaðir fyrstu løtuna, tí Jón Krosslá Poulsen legði gestirnar á odda. Men heimaliðið vendi dystinum og vann greitt.

Á Toftum spældu B68 og ÍF. Úrslitið var 3-3.

## Komandi dystirnir

Sunnudagin spæla B71 og FC Suðuroy á Sandi. Um sandoyingar fáa fult, er so at siga staðfest, at teir spæla í bestu deildini í komandi kappingarári.

B36 og ÍF spæla í Gundadali. Fuglfirðingar stríðast framvegis fyri sínum møguleika at vinna sær luttøku í evropiskari kapping.

B68 og Víkingur spæla á Svangaskarði.

Mánakvøldið spæla EB/Streymur og HB við Margáir. Tað er aftur ein sera torførur útidystur hjá føroyameistarunum. Tá fáa teir reyðu og svørtu seg væntandi roynd av álvara.

NSÍ fær vitjan av botnliðnum AB.

uni@sosialurin.fo

### Føroyska Vodafonedeildin (vodafone deildin)

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 23 | 13 | 5 | 5 | 41 | 27 | +14 | 44 |
| 2 | NSÍ | 23 | 12 | 6 | 5 | 46 | 26 | +20 | 42 |
| 3 | EB/Streymur | 23 | 11 | 8 | 4 | 54 | 28 | +26 | 41 |
| 4 | Víkingur | 23 | 11 | 7 | 5 | 41 | 27 | +14 | 40 |
| 5 | ÍF | 23 | 10 | 7 | 6 | 43 | 37 | +6 | 37 |
| 6 | B36 | 23 | 8 | 7 | 8 | 35 | 33 | +2 | 31 |
| 7 | B68 | 23 | 6 | 7 | 10 | 35 | 42 | -7 | 25 |
| 8 | B71 | 23 | 5 | 7 | 11 | 21 | 47 | -26 | 22 |
| 9 | FC Suðuroy | 23 | 4 | 6 | 13 | 29 | 48 | -19 | 18 |
| 10 | AB | 23 | 1 | 8 | 14 | 25 | 55 | -30 | 11 |

**B71 - B36** 0-0 (0-0)

**B68 - ÍF** 3-3 (2-1)
1-0: Pól Jóhannus Justinussen, 24.
2-0: Ahmed Keita, 30.
2-1: Bartal Eliasen, 32.
2-2: Dánjal á Lakjuni, 46.
3-2: Pól Jóhannus Justinussen, 55.
3-3: Andy Olsen, 73.

**NSÍ - Vík.** 0-1 (0-0)
0-1: Erland Berg Danielsen, sjálvmál, 67.

**EB/Str. - FCS** 5-2 (5-1)
0-1: Jón Krosslá Poulsen, 12.
1-1: Daniel Udsen, 19.
2-1: Daniel Udsen, 31.
3-1: Suni úr Hørg, sjálvmál, 32.
4-1: Hans Pauli Samuelsen, 40.
5-1: Arnbjørn Hansen, 43.
5-2: Jón Krosslá Poulsen, 60.

**HB - AB** 3-0 (1-0)
1-0: Fróði Benjaminsen, 9.
2-0: Rógvi Poulsen, 71.
3-0: Rógvi Poulsen, 90.